FISKIMÁLASTÝRIÐ
FISKIVINNUSTOVAN

Tórshavn, tann 28. mai 2001
J.Nr.: 20000342-25 / 140
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AK/mn

Tygara skriv

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Postboks 208
110 Tórshavn

Víst verður til skriv tykkara dagfest 9. mai 2001, har heitt verður á Jørgen Niclasen, landsstýrismann um at seta seg í samband "við allar persónar/øll tey feløg, ið landsstýrið hevur givið tilsøgn um royndarloyvi at fiska tun við útlendskum skipum og spyrja hesi, um tey hava fingið nakra samsýning frá útlendsku skipunum/feløgunum í sambandi við, at royndarloyvi vórðu givin."

Sagt skal verða frá, at Fiskimálastýrið í skrivi dagfest 15. mai 2001 sendi teimum feløgum, sum hava havt tilsøgn samsvarandi oman fyri standandi eitt skriv, har biðið var um, at feløgini saman við próvskjølum lótu Fiskimálastýrinum umbidnu upplýsingarnar – sí avrit hjálagt.

Higartil hevur bert Sp/f Nancy, 160 Argir svarað áheitanini. Avrit av svarinum er lagt við.

Ásannandi at hini feløgini ikki hava svarað, hevur Fiskimálastýrið í dag sent hesum feløgum eina áminning um at svara beinavegin.

+ skjøl.

v. Fiskimálastýrið

A. [signature]

29. MAJ 2001

Løgtingið j. nr. 7/3 20000003 20

YVIRI VIÐ STROND 17 - 19 • POSTSMOGA 347 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 30 30 • TELEFAX 35 30 35
E-MAIL: FISK@FISK.FL.FO

FISKIMÁLASTÝRIÐ
FISKIVINNUSTOVAN

**AVRIT**

Tórshavn, tann 15. maj 2001
J.Nr.: 20000342-23 / 140
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EK/el

Tygara skriv 7.13.20000003

Sum tykkum uttan iva kunnugt, hevur landsstýrismálanevndin gjørt av at kanna viðurskiftini viðvíkjandi ávísum viðurskiftum í sambandi við, at útlendsk skip í samstarvi við føroysk feløg hava fingið royndarloyvi at veiða tunfisk í føroyskum sjógvi síðani 1997.

Í skrivi frá landsstýrismálanevndini dagfest 9. mai 2001 verður heitt á landsstýrismannin í fiskivinnumálum, um at fáa til vega upplýsingar frá teimum føroysku feløgunum, sum hava luttikið í hesum samstarvinum, "um tey hava fingið nakra samsýning frá útlendsku skipunum/feløgunum í sambandi við, at royndarloyvi vórðu givin."

Samsvarandi hesi áheitan verða tit vinarliga biðin um at lata Fiskimálastýrinum umbidnu upplýsingar saman við próvskjølum í seinasta lagi 21. mai 2001.

v. Fiskimálastýrið

Sent til:

Sp/f Ågot, v/Eyðstein Poulsen, Skáltavegur 63, 700 Klaksvík
Nancy Ltd, Reynstún 19,160 Argir
Sp/f Far-Nipp, Giljanes, 360 Sandavágur
Faroe Seafood Prime, Postboks 68, 110 Tórshavn

YVIRI VIÐ STROND 17 - 19 • POSTSMOGA 347 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 30 30 • TELEFAX 35 30 35
E-MAIL: FISK@FISK.FL.FO

*Nancy* Ltd.
Reynstún 19
FO-160 ARGIR
Faroe Islands
Tel. (+298) 317425, Fax. 311608
E-mail: nancybj@hotmail.com

AVRIT

Date: 22.05.2001

Fiskimálastýrið
Yviri við Strond 17-19
FO-100 Tórshavn
Att.: Andras Kristiansen

Viðv. royndarveiðu eftir tunfiski.

Víst verður til bræv tykkara 15. mai 2001 við fyrispurningi frá landsstýrsimálanevndini um samsýning frá útlendskum feløgum í samband við royndarveiðu eftir tunfiski.

Fyrst er at siga at okkum dámar væl at landsstýrismálanevndin kannar hesi viðurskifti, tí vit meta, at spf Nancy og serliga undirritaði er lagdur undir ymiskt í hesum sambandi, sum ikki er í tráð við verunleikan og vón okkara er, at illgitingar og ósannindi, sett fram beinleiðis á løgtingsins røðarapalli og í Útvarpi Føroya, kunnu verða afturvíst. Eisini halda vit, at spf Nancy hevur fingið ósømiliga viðferð frá Fiskimálastýrinum í samband við royndirnar eftir tunfiski. Vit eru tískil altíð tilreiðar at greina nærri, møguliga á fundi við landsstýrismálanevndina, hvat er fari fram í samband við royndarveiðu eftir tunfiski. Eisini loyva vit okkum at viðgera hesi evni nærri niðanfyri.

Eftir áheitan frá útlendskum felag søkti spf Nancy um ársskifti 1995/96 um loyvi at royndarveiða eftir tunfiski í føroyskum sjóøki. Ikki fyrr enn í september 1997, eftir at aðrir høvdu roynt seg, slapp spf Nancy í gongd við hendan fiskiskap. Hetta varð skipað sum royndarfiskiskapur við tveimum japanskum línuskipum. Fyri arbeiðið, sum spf Nancy gjørdi í hesum sambandi, fekk spf Nancy samsýning frá einum útlendskum felag, sum umboðaði japansku skipini.
Í 1998 og 1999 fekk spf Nancy loyvi at royndaveiða við einum japanskum skipi, samstundis sum tvey onnur feløg fingu líknandi loyvi. Øll trý feløgini samskipaðu royndarveiðuna og settu einsljóðandi peningaligar treytir til útlendsku feløgini.
Árini 1997-99 hevði spf Nancy ársúrslit ávikavist 39.139 kr, 181.427 kr og 439.805 kr, har meginparturin stavar frá virksemi viðv. royndarfiskiskapi eftir tunfiski.

Sum nevnt omanfyri blivu illgitingar settar fram alment móti undirritaða í samband við royndir eftir tunfiski. Hetta var í stuttum, at undirritaði hevði misnýtt sítt almenna starv fyri at 'tiltuska' sær 'tunfiskaloyvi' og at spf Nancy hevði forvunnið milliónir upp á hesi loyvi. Sum nevnt hevur spf Nancy ikki vunnið millónir, tíverri. Vísast kann á, at undirritaði alla tíðina arbeiddi við opnum kortum og í brævið legði upp til at Fiskimálastýrið skuldi góðkenna allar mannagongdir og sáttmálar - hetta tóktist tó ikki at hava áhuga. Eisini í brøvum og á fundum eftirlýsti undirritaði eini útsøkn frá Fiskimálastýrinum um tað var ein trupulleiki at undirritaði var í almennum starvi og

samstundis fekst við royndarfiskiskap í privatum felag. Fiskimálastýrið kom ongantíð við eini tílíkari støðutakan. Undirritaði frætti eisini, at fundur var um hesi viðurskifti á hægri staði í landsumsitingini, men ongið boð komu um at broyta hesi viðurskiftið.

Fyri at fáa eina meira fullfíggjaða mynd av hvat er farið fram, átti landsstýrismálanevndin eisini at kanna onnur viðurskifti. Trý dømi eru:
1) Vit eru vitandi um, at treytirnar, sum Fiskimálastýrið setti føroysku feløgunum, sum fingu tilsøgn um at royndarveiða eftir tunfiski, ikki vóru eins og at spf Nancy tí hevur haft størri útreiðslur samanborið við annað felag. Hetta halda vit ikki er í tráð við góðan umsitingarsið og heita vit tí á landsstýrismálanevndina at kanna hesi viðurskifti.
2) Eisini eigur landsstýrismálanevndin at kanna, um tað, sum fór fram í samband við løgtingsvalið í 1998, er í tráð við góðan umsitingarsið. Her kann vísast á, at ringt bleiv úr fiskimálastýrinum til reiðarí, sum hevði søkt um 'tunfiskaloyvi', tveir dagar undan valinum við boðum um at loyvið varð givið, men at hetta ikki skuldi komu út fyrr enn eftir valið. Eisini er próvfast, at landsstýrismaður persónliga setti seg í samband við umsøkjara og lovaði 'tunfiskaloyvi' afturfyri stuðul til valið.
3) Spf Nancy fekk ikki loyvi at halda fram við royndarfiskiskapinum í 2000 grundað á: 'at Fiskimálastýrið metir, at tær royndir, sum higartil eru gjørdar við japonskum skipum, hava givið føroyingum hollan kunnleika sjálvir at standa fyri fiskiskapi eftir tun í komandi árum'. Hóast hesa grundgeving gevur Fiskimálastýrið einum felag í Klaksvík loyvi at gera samstarvsavtalu við eitt japanskt reiðarí um royndarfiskiskap eftir sama leisti, sum var nýttur árini frammanundan. Hetta var gjørt fyri at loyva felaganum 'at kunna styrkja seg' sum landsstýrismaðurin málbar seg í Útvarpi Føroya 19/2-2000. Í brævi 3/1-2000 frá Fiskimálastýrinum til viðkomandi felag gongur eisini týðuliga fram, at ætlanin var at felagið skuldi vinna pening upp á hetta loyvið, tí Fiskimálastýrið hevði ikki annan møguleika at stuðla felagnum peningaliga.
Árini frammanundan vórðu loyvini givin við heimild í §20 og §23 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap har ma. tosað verður um 'at menna nýggja veiðu'. Loyvið í 2000 er givið við grundgeving um at eitt ávíst felag skuldi fáa vinning - hetta er neyvan heimilað í nakrari lóg.

Undirritaði fegnast um, at royndirnar eftir tunfiski komu í lag og at tað bleiv prógvað at tað í hvussu er ávísar tíðir er møguligt at reka lønandi veiðu eftir tunfiski í føroyskum sjóøki. Tann viðferð sum spf Nancy hevur fingið frá Fiskimálastýrinum har onnur feløg hava verið tikin framum eins og spf Nancy hevur fingið verri treytir at arbeiða undir enn onnur feløg kunnu tó undir ongum umstøðum góðtakast.
Eisini er tað ørkimlandi at myndugleikarnir passivit hyggja at, meðan undirritaði verður útspiltur alment, tá orsøkin er væntandi og/ella skeiv støðutakan og kunning frá myndugleikunum.

vegna spf NANCY

B. Thomsen

Bjarti Thomsen

FISKIMÁLASTÝRIÐ

25 MAJ 2001

J NR. 20000342-24/140